

## Triðingurin minni av fiski

Útfluttu nøgdirnar av fiski eru minkaðar ein triðing fyrsta hálvár, samanborið við somu tíð í fjør. Fiskaútflutningurin er sostatt komin niður á 120 túsund tons. So lítið er ikki útflutt av fiski eitt fyrsta hálvár síðan miðskeiðis í nítiárunum, skrivar Hagstovan á heimasíðu sínari. Tað er framvegis nøgdin av uppisjóvarfiski sum minkar mest, úr 80 túsund tonsum niður í 34 túsund tons, ella 57 prosent, meðan mongdin av alifiski veksur mest, úr 16 túsund tonsum upp í 22 túsund tons, svarandi til 39 prosent. Hóast stóra minking í tonsum er virðið av útflutta fiskinum bert minkað 5 prosent, tað svarar til 89 milliónir krónur. Tað kemst serliga av, at útflutningsvirðið av alifiski er vaksið við meir enn eini helvt, úr 423 milliónum til 649 milliónir krónur. Samlaði útflutningurin var fyrra hálvár góðar 1,8 milliard krónur og er hetta ein minking uppá 16 prosent, samanborið við í fjør.

# r upp á at sløkkja






### Fylg rákinum

*Úr 10 í 5 minuttir undir brúsuni*
*Hong klæðini heldur enn at brúka turkitrumlu*
*Skrúva gólvhitan niður úr 24 í 20 stig*
*Fyll fleiri fólk í bilin*
*Hav kjøtleysar dagar*
*Keyp lokalt framleiddar vørur*
*Innkeypsnet úr klæði*
*Kompost til lívrunnið burturkast*
*Koyr ikki góðan mat burtur*
*Spariperur allastaðni*
*Spariskinnarar til el*
*Onga stand-by nýtslu*
*Burtur við frystiboksini*
*Orkusparandi hvítvørur*
*Sløkk ljósið*

Fá fleiri góð ráð á: www.1tonmindre.dk

### Klædnavask

*Úr 40 í 20 stig sparir 61 % el*
*Úr 60 í 40 stig sparir 60 % el*

### Í køkinum

| Hugskot | Minking í el-nýtslu |
|---|---|
| *Dampkóka* | *33 %* |
| *Kaldan ovn/eftirvarmi* | *25 %* |
| *Breyðristari heldur enn ovn* | *90 %* |
| *Brúka heitluft og fyll ovnin hvørja ferð* | *60 %* |
| *Brúka elketil* | *50 %* |
| *Uppvask v/50 stig* | *10-20 %* |

*Tiðna matin í køliskápi*
*Feittfiltur á eymhettuni skal vera reint*

Hetta var útgangsstøðið hjá kenda danska lívsstílsserfrøðinginum, Christine Feldthaus, í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, har hon greiddi frá, hvussu húskið hennara hevur minkað um útlátið av veðurlagsgassum við meiri enn 6 tonsum, ella við einum triðingi, seinasta árið. Hetta hevur eisini givið teimum eina sparing upp á 16.000 kr. Men tá gjørdu tey eisini eina íløgu á 20.000 kr. sum loysir seg í longdini, tí tey bjálvaðu húsini.

- Bara í hita minkaði rokningin við 1600 kr. árliga. Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum. Men um øll royna at leggja vanarnar eitt lítið sindur um, so verður tað nógv tilsamans, segði hon.

Í miðal letur ein amerikanari 28 tons av Co2 út árliga, ein dani 15 tons , meðan hvør persónur í Kenja letur 1 tons út árliga. Mett verður, at Føroyar liggja ájavnt Danmark.

Sambært Feldtheus er málið, at øll koma niður á 1 tons í part árliga. Her er langur vegur, tá hugsað verður um, at teirra húskið megnaði at fara úr 18 tonsum niður í 12 tons eftir einum ári. Og tey gjørdu veruliga nógv fyri at minka um útlátið – tó uttan á nakran hátt at fara niður í livistøði.

Størstu broytingarnar í familjuni Feldthaus vóru, at tey bjálvaðu húsini, skiftu køliskápið út, løgdu seg eftir at sløkkja eitt nú allar standby funktiónir, seldu annan bilin og minkaðu talið av longum flogferðum.

- Tað einasta, sum broyttist í gerandisdegnum var, at nú má leggja ferðingarmynstrið betri til rættis við at brúka almenna ferðslu og súkkluna. Men tað hevur lítið upp á seg, tí reyvin, sum var av smør, verður vónandi til stál. Tí tað grøna skal vera stuttligt. Annars fáa fólk bara vaml og verða líkasæl.